

*Ætlanirnar um handil í SMS eru lagdur á ís, men ikki steðgaðar*

# Rúsan má fáa aðrar møguleikar

**– Eingin ætlan er steðga enn. Vit hava sett SMS ætlanirnar á standby, men so má samgongan vísa á aðrar møguleikar hjá Rúsuni, sigur Johan Dahl, landsstýrismaður í Vinnumálum.**

Barbara Holm

Løgmaður hevur heitt á landsstýrismannin við Vinnumálum, Johan Dahl, um at steðga ætlanunum hjá Rúsdrekkasølu Landsins at lata ekslusivan handil upp í SMS.

Samgongufundur er mánadagin, og tá skal samgongan viðgera hetta málið.

– Eg havi nakrar hugsanir um, hvussu vit kunnu hjálpa Rúsuni at náa tí politiska kravinum, sum er álagt henni, og tað ætli eg mær at greiða samgonguni frá mánadagin, sigur Johan Dahl.

Hann heldur, at skal samgongan steðga ætlanunum hjá Rúsuni at lata upp í SMS, so noyðist samgongan at vísa á aðrar møguleikar hjá Rúsuni at náa tí politiska kravinum.

– Eg havi fleiri ferðir víst á, at samgongan noyðist at lækka avlopskravið hjá Rúsuni. Vil samgongan ikki tað, so mugu vit finna onkran máta, at náa avlopskravinum, sigur Johan Dahl.

Hann slær fast, at ætlanirnar um at lata upp í SMS enn ikki eru sleptar.

– Eg havi lovað løgmanni, at seta málið á standby, inntil samgongan hevur viðgjørt málið, men einki er slept enn, sigur Johan Dahl.

# Ynskja fleiri føroyskar skaldsøgur

**BÓKADAGUR Árligi bókadagurin hjá Rithøvundafelagnum verður sunnudagin, og temaið fyrwi pallborðið í ár er fáu føroysku skaldsøgurnar, og hvussu økjast kann um hesar**

Leo Poulsen

Rithøvundafelagið heldur fast við gomlu traditiónina at skipa fyri einum árligum bókadegi.

Vanliga verður hesin dagurin hildin í Norðurlandahúsinum, men í ár er húsið upptikið av sangleikinum Jesus Christ Superstar, og tí hevu verið neyðugt at funnið onnur høli. Loysnin er eitt býti millum Miðlahúsið og Hvonn, har barnatiltakið, pallborðið og bókasølan umframt onkur upplestur verður í Miðlahúsinum, meðan flestu upplestrarnir so verða á Hvonn.

– Vit halda tað verða stuttligt og spennandi at royna nøkur nýggj høli, og tað verður áhugavert at vita, um bókadagurin verður eins væl vitjaður sum hann plagar, sigur Rakel Helmsdal, sum er forkvinna í Rithøvundafelagnum.

Á bókadegnum verða fyrst og fremst uppruna føroyskar bøkur vístar fram, men eisini týddar bøkur eru við.

– Tað eru ikki so nógvar føroyskar bøkur komnar í ár, men hinvegin er ein rúgva av týddum bókum. Talan er í fleiri førum um heimsbókmentir, sum jú eisini hava stóran týdning, sigur Rakel Helmsdal.

Bókadagurin er hildin fyri at seta fokus á bókmentir.

– Bókmentir er tann listargrein, sum er minst sjónlig. Fólk lesa bøkurnar heima í síni egnu stovu, og ljós verður ikki varpað á hesa listargrein á sama hátt sum eitt nú málningalist, tónleik ella sjónleik, sigur Rakel Helmsdal.



FOKUS Á BÓKMENTIR

*Rakel Helmsdal, forkvinna í Rithøvundafelagnum, er spent upp á, hvussu bókadagurin fer at rigga í øðrum umhvørvi*

## Signera bøkur

Dagurin byrjar klokkan 14 sunnudagin við einum barnatiltaki, sum verður í Miðlahúsinum.

– Har verður millum annað eitt barnakór, sum fer at syngja, og síðani verður høvi hjá børnunum at tekna. Klokkan trý byrjar so sjálvur bókadagurin, sigur Rakel Helmsdal.

Rithøvundarnir til nýggju bøkurnar verða sjálvandi til staðar, og fleiri teirra fara at hava upplestur.

– Flestu upplestrarnir verða á Hvonn, tó at onkur verður í Miðlahúsinum. Sjálv bókasølan verður eisini í Miðlahúsinum, og so kunnu fólk ganga ímillum. Tað verður spennandi at vita, hvussu tað fer at rigga, sigu Rakl Helmsdal.

Rit & Rák hevur í fleiri ár staðið fyri bókasøluni, og tað gera teir eisini í ár, og sum vanligt kunnu fólk fáa bøkurnar signeraðar av høvundanum.

Rithøvundafelagið er eitt rímiliga stórt felag við oman fyri hundrað limum.

– Treytin fyri at gerast limur í Rithøvundafelagnum er, at tú í minsta lagi skal hava skrivað eina bók. Limatalið er rímiliga stórt, men tað eru sjálvsagt ikki allir limir, sum eru aktivir, sigur Rakel Helmsdal.